# Umhvørvispolitikkur

## INNGANGUR

Umhvørvispolitikkurin byggir á visiónina um støðugt at mennast og gerast betri. Kommunala Brennistøðin skal taka atlit til umhvørvið bæði í dagliga virkseminum, og tá íløgur skulu gerast.

Kommunala Brennistøðin fylgir galdandi lógum, reglum og umhvørvisgóðkenningum, umframt ISO-14001 standardi. Alt útlát frá brennistøðini skal viðgerast við atliti at umhvørvinum fyri at hava minst møgulig neilig árin á umhvørvið. Kommunala Brennistøðin skal áhaldandi arbeiða við skrásetingum og mátingum fyri at kunna gera ítøkiligar umhvørvisligar batar.

## BURTURKASTSTIGIN

Fyri at verja umhvørvið og fyri at eggja til ringbúskap arbeiðir Kommunala Brennistøðin eftir burturkaststiganum. Tað er í fyrstu atløgu at fyribyrgja burturkasti, síðan endurnýta, endurvinna, orkuútvinna og í síðstu atløgu tyrva burturkast.

**Fyribyrging:** Kommunala Brennistøðin skal hava ein virknan leiklut í arbeiðinum at minka um nøgdir av burturkasti. Hetta verður gjørt við støðugt at kunna borgarar, skúlar og vinnu um burturkast og soleiðis eggja teimum at taka stig til átøk við fyribyrgjandi endamáli.

**Endurnýtsla:** Kommunala Brennistøðin skal hava gott samstarv við fyritøkur, ið arbeiða við endurnýtslu, og so vítt møguligt skapa góðar karmar fyri endurnýtslu. Málið er bæði at økja um endurnýtsluna og eisini um vørubólkar at endurnýta.

**Endurvinning:** Kommunala Brennistøðin vil varðveita mest møguligt tilfeingi í ringrás og virka fyri áhaldandi at gerast betri. Tilfar, ið verður flutt av landinum til endurnýtslu, skal flytast á ein umhvørvisliga skilagóðan hátt.

**Orkuútvinning:** Mest møgulig orka skal verða brúkt til fjarhita. Kommunala Brennistøðin skal hava gott samstarv við Fjarhitafelagið og fer støðugt at heita á viðkomandi áhugabólkar at økja um nýtsluna av fjarhita.

**Tyrving:** Kommunala Brennistøðin virkar fyri, at tyrvt verður á umhvørvisliga skynsaman hátt. Tilfar, ið verður tyrvt, skal ikki geva frá sær evni, sum skaða heilsu og umhvørvi.

## STARVSFÓLK

Kommunala Brennistøðin skal áhaldandi menna førleikar hjá starvsfólki, so at tey kunnu handfara burturkast á ein umhvørvisliga skynsaman hátt. Starvsfólk vegleiða borgarar og vinnu, hvussu burturkast skal handfarast.

Starvsfólk á Kommunalu Brennistøðini hava ábyrgd av at útinna umhvørvispolitikkin og støðugt at leita eftir nýggjum umhvørvisliga góðum loysnum at seta í verk á Kommunalu Brennistøðini.

Kommunala Brennistøðin raðfestir arbeiðsumhvørvið høgt og skal hava eina vælvirkandi trygdarskipan.

## EFTIRMETING

Fyri at tryggja at umhvørvispolitikkurin støðugt mennist, vil leiðslan regluliga eftirmeta politikkin í mun til góðkenningar og galdandi krøv.

Endurnýtslan